Landssjúkrahúsið

**Útbjóðingartilfar**

Flutningur til og úr Føroyum

J.C. Svabosgøta 41-49 • 100 Tórshavn • Tel. (298) 304500 • fax 314253 • www.ls.fo • ls@ls.fo

## 1. Inngangur

Í samsvari við ásetingarnar um alment innkeyp vil Landssjúkrahúsið (LS) við hesum bjóða út flutningin til og úr Føroyum.

Landssjúkrahúsið flytir inn eina røð av útgerð og nýtsluvørum til viðgerðir, kanningar og røkt. Talan er sostatt um nógvar ymsar vørubólkar, sum eru nærri greinaðir í tilfarinum.

Flutningsfeløg eru vælkomin at bjóða upp á allar bólkarnar ella stakar bólkar í útbjóðingartilfarinum.

## 2. Vørugreining

### 2.1 Vanligar nýtsluvørur
Vanligar nýtsluvørur fevna í høvuðsheitum um vørur til viðgerðir, kanningar og røkt. Eisini hoyra minni tól, lániinstrument og eykalutir til henda bólk umframt ávísar reinførisvørur. Hesar nýtsluvørurnar eru turrvørur, og eingi stórvegis krøv eru um hita.

Vanligar nýtsluvørur við serligum flutnings- og handfaringartreytum eru týðiligar merktar við ásetingunum. Til dømis pílar, ið áseta, hvønn veg eskjan skal venda, ásetingar um sólarljós e.l.

Støddin á sendingunum er sera ymisk. Alt frá smápakkum/brævapakkum til sendingar upp á 10-12 plattar.

### 2.2 Kølivørur
Nakrar regluligar minni sendingar eru við kølivørum. Týdningarmikið er, at veitarar kunnu skjalfesta óbrotnað køliketu frá móttøku til levering.

### 2.3 Frystivørur
Nakrar fáar frystisendingar eru. Hetta eru í høvuðsheitum skundsendingar, ið eru pakkaðar við turrísi, og hoyra tær eisini undir bólkin skundvørur og vandamiklar vørur. Týdningarmikið er eisini her, at veitarar kunnu skjalfesta óbrotnað køliketu frá móttøku til levering, har turrísur ikki verður nýttur.

### 2.4 Skundvørur
Skundvørur eru vanliga eykalutir til týðandi viðgerðar- ella rakstrartól umframt implantat ella instrument til ávísar viðgerðir og kanningar. Greiðar mannagongdir eru um, hvør hevur heimild at bíleggja skundvørur og harvið skundflutning. Bert flutningsumbønir, ið fylgja mannagongdunum, kunnu skuldskrivast Landsjúkrahúsinum.

### 2.5 Vandamiklar vørur
Í øllum vørubólkunum omanfyri eru ávísar vørur, ið krevja serliga vandamerking undir flutningi, og har databløð eiga at fylgja vøruni/flutningspappírunum.

## 3. Flutningsbólkar

### 3.1 Sjófrakt
Sjófrakt verður at brúka til allar vanligar sendingar, sum eru so mikið stórar ella soleiðis háttaðar, at sjófrakt er bíligasta, besta ella einasta loysnin.

Tað vil siga, at sendingar har tað er bíligast at senda við sjófrakt, skulu sum høvuðsregla flytast til ella úr Føroyum við skipi. Krav er í ávísum førum, at sending kemur samlað til LS. Tað vil siga, at avsendari sendir frá fleiri goymslum, men har vørurnar skulu sum ein sending til Føroyar. Ella um talan er um vøru, ið bert passar í vavi til sjófrakt.

Sjófraktin er í høvuðsheitum í vanligum turrbingjum, men eisini á køl ella frost.

### 3.2 Flogfrakt
Flogfrakt verður vanliga brúkt til smærri sendingar, har lítil og eingin prísmunur er á loftvegis ella sjóvegis flutningi. Eisini verður vanlig flogfrakt brúkt til sendingar, har leveringstíðin við sjófrakt er ov long.

Talan kann vera um frysti- ella kølisendingar loftvegis umframt vanligar sendingar.

### 3.3 Skundfrakt
Skundfrakt kemur við flogfari við ella uttan prioritet. Serligar mannagongdir eru um, hvør kann bíleggja skundfrakt. Bert flutningsumbønir, ið fylgja mannagongdunum, kunnu skuldskrivast Landsjúkrahúsinum.

Talan kann vera um frysti- ella kølisendingar loftvegis umframt vanligar skundsendingar.

## 4. Krøv til flutningstænastu

Afturat krøvunum omanfyri til vørurnar og flutningshættirnar setir LS fylgjandi krøv til flutningsveitarar:

### 4.1 Pappírskrøv
Saman við farmarokning skulu fylgja neyðug innflutningsskjøl, tó í minsta lagi vørufakturi. Í serligum førum fylgir proforma fakturi vøruni. Farmarokning verður saman við veitarafaktura v.m. at senda skjótast til ber ella í seinasta lagi dagin eftir uppskiping/komu til LS umvegis teldupost. LS hevur tollkreditt og innfortollar allar sendingar.

Farmarokning kann sendast talgilt til BSL, Búskaparskipan Landsins, umvegis EAN 5797100000058.

Tá talan er um retursendingar, ger LS proformafaktura, tá upprunafakturi ella kreditnota frá veitara ikki eru tøk. LS upplýsir í hvørjum einstøkum føri, hvør rindar fraktina.

## 4.2 Leveringsstøð

Farmabrøvini skulu týðiliga vísa, hvar á LS vøran skal leverast.

Hesi eru mest vanligu móttakarar/leveringsstøð:

- Felagsgoymslan
- Rannsóknarstovan
- Vaskaríið
- Tekniska Deild
- Medico Tekniska Deild
- Portørar/Ambulancutænastan

Tá talan er um serligar skundsendingar, avtalar LS nágreiniliga við flutningsveitara, hvar á LS vøran skal leverast.

Heintingarstøðini til retursendingar eru tey somu sum omanfyrinevndu leveringsstøð.

Levering og heinting fara vanliga fram í tíðarskeiðnum millum kl 08:00 og kl 15:00 (fríggjadag tó til kl 14:00). Veitari kann einans eftir avtalu í hvørjum einstøkum føri levera uttan fyri ásetta tíðarskeið.

## 4.3 Pakking

Tá vøran verður leverað á LS, skal vøran vera turr, heil og væl innpakkað. Flutningsveitari skal skjalaprógva, at møguligir skaðar ikki eru komnir á vøruna, meðan flutningsveitari hevur havt ábyrgdina fyri vøruni.

Hevur vøran týðandi skaðar, tilskilar LS sær rætt til at nokta fyri móttøku í samsvari við galdandi LS mannagongdir fyri vørumóttøku.

Veitarar verða bidnir at lýsa, hvussu veitari handfarir tilíkar støður. Tað vil siga, at ein lýsing er í tilboðnum, hvussu veitari umsitur støður, har LS noktar móttøku ella kemur við klagu um flutningin. Hvat hendir við farmi, farmarokning, endurgjaldi o.l.

## 4.4 Annað

Sí hentar leinkjur viðvíkjandi ávíkavist lívrunnum vørusendingum og sendingum við lítlari væl vardari geislavirknaðari keldu.

http://www.rm.dk/files/Regionshuset/HR-afdelingen/Fysisk%20Arbejdsmilj%C3%B8%20Horsens/Ny%20hjemmeside/Transport%20af%20farligt%20gods/Retningslinier%20for%20forsendelse%20af%20biologiske%20stoffer%20ver%201%202013.pdf

http://sundhedsstyrelsen.dk/publ/Publ2013/12dec/radioaktivtstofTransport2012.pdf

## 5. Vavið á sendingum

LS hevði í 2013 umleið 2.200 sendingar til og úr Føroyum. Mett verður, at umleið 5-10% av sendingunum (ella partur av sending) fara aftur til avsendara.

LS rindar fyri uml. 75% av sendingunum. Restin eru sendingar, har veitari bíleggur og rindar fraktina til Føroyar. Tá talan er um retursendingar, er býtið umleið 50/50.

LS flytir vøru til Føroya úr fleiri londum. Meginparturin kemur úr Danmark. Fleiri veitarar hava tó miðsavnað sínar goymslur, antin fyri norðanlond ella Europa. Í dag eru miðsavnaðu goymslurnar aloftast í Svøríki, Belgien ella Hollandi.

## 6. Tillutan v.m.

### 6.1 Mannagongd

Tilboðsviðgerðin er soleiðis, at fyrst verður kannað eftir, um veitari megnar at lúka krøvini til flutning og tænastu. Herundir eisini at handfaring við skaðum og retursendingum er nøktandi – tað vil siga í samsvari við LS mannagongdirnar um vørumóttøku.

Tá krøvini eru í lagi, verður ein príssamanbering gjørd millum veitarar fyri hvønn flutningsbólk. Stórur dentur verður lagdur á, at samanberingargrundarlagið er so eins sum gjørligt. Víst verður eisini til petti 6.2.

LS tilskilar sær rætt til at kanna tænasturnar nærri ella biðja um skjalaprógv fyri, hvussu tænastukrøvini verða fylgd. Endamálið er, at samanberingargrundarlagið er eins og at tryggja, at veitari lýkur ásettu tænastukrøvini og nøktandi leverar tænastuna í innkomna tilboðnum.

Fraktin er sum nevnt omanfyri býtt sundur í flutningsbólkar, og tillutað verður fyri hvønn bólk sær.

### 6.2 Príssamanseting

Tað er ein fyrimunur, um veitari innroknar ymisk pappírsgjøld og handlinggjøld í prísin á sendingum. Her kann til dømis upplýsast prísir FAS, FOB, CIF og DDU. Avsendari hevur ábyrgdina fyri útflutningsskjøl, uttan annað er týðiliga avtalað sum til dømis EXW sendingar. Tilskilað um neyðugt, hvør Incoterms-útgáva verður nýtt.

Koyring uttanlands kann standa sum ein postur fyri seg. Levering í Føroyum (til LS) er altíð við í prísinum. Um serlig viðurskifti eru galdandi fyri koyring frá Vága floghavn til LS, skal hetta framganga týðiliga í tilboðnum.

Týðiligur skilnaður skal eisini gerast millum prísin á vanligari vøru og ”tempereraðari” vøru.

Til dømis kunnu prísir upplýsast soleiðis:

| | EXW | FAS | FOB | CIF | DDU |
|---|---|---|---|---|---|
| **Sjófrakt** – fyri tonsið ella $m^3$<br>- vanlig til og úr FO<br>- tempererað til og úr FO | | | | | |
| **Flogfrakt** – fyri kg ella $m^3$<br>- vanlig til og úr FO<br>- tempererað til og úr FO | | | | | |
| **Skundfrakt** – fyri kg, $m^3$ ella sendingina<br>- vanlig til og úr FO<br>- tempererað til og úr FO | | | | | |
| **Vandamikið góðs** – møgulig eykagjøld | | | | | |

Hetta er prísurin til LS, tá avsendari og LS hava avtalað leveringsrammu. Eru aðrir kostnaðir tengdir at prísinum, skal tað týðiliga tilskilast. Somuleiðis, um ávísar treytir eru grundarlag undir prísinum. Ávísar treytir verða viðgjørdar saman við LS krøvum, sí petti 6.1.

## 7. Tilboðini

Tilboð skulu vera Landssjúkrahúsinum í hendi innan 17. november 2014 kl 12:00.

Spurningar skulu setast skrivliga til lsanymi@ls.fo innan 22. oktober 2014 kl 10:00.

Spurningar og svar verða almannakunngjørd á keypsportalinum 31. oktober 2014.

Miðað verður eftir, at avtala(ur) kann(kunnu) setast í gildi 1. januar 2015.
Tilboðsvinnari(ar) verða(ur) kunngjørd á keypsportalinum í seinasta lagi 15. desember 2014.

Vinarliga stíla tilboðið til:

Landssjúkrahúsið
Felagsgoymslan, att. Anya S. Midjord
J.C. Svabosgøta
100 Tórshavn
lsanymi@ls.fo (um tilboð verður latið í teldutøkum formi)